Álit

í

løgtingsmáli nr. 66/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum (Lækka virðisavgjaldið fyri persónbilar við hybrid tøkni og persónbilar við plugin-hybrid tøkni, rokna skrásetingargjaldið á innfluttum brúktum motorakførum við støði í keypsprísinum, frítaka flytigóðsmotorakfør frá skrásetingargjaldi, stytta tíðarskeiðið fyri undantøku av virðisavgjaldi hjá hýru- ella skúlavognum og leingja undantøkuna fyri at rinda virðisavgjald fyri motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 8. desember 2020 og eftir 1. viðgerð 10. desember 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12., 14., 26. og 28. januar 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri bilasølurnar Reyni Service, Auto Service, Bilasøluna, Waag bilar, Wenzel, Nordbil, Nordcar, Berg Motors og Bilrøkt, AUTO Taxi, Gunnar Justinussen, Sp/f Rhesa, Ólav Poulsen, Ringrás, Føroya Náttúruverndarfelag, SEV, landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, saman við Umhvørvisstovuni og við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við Akstovuni og TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen og Kristin Michelsen) vísir á, at fleiri broytingar verða skotnar upp í hesum uppskotinum. Nakrar av broytingunum hava til endamáls framhaldandi at eggja borgarum at keypa umhvørvisvinarligar persónbilar, soleiðis at vit í Føroyum áhaldandi minka um útlátið av CO2, meðan aðrar av broytingunum ikki beinleiðis hava við hetta endamálið at gera.

Lógin í dag hevur bert skrásetingargjaldsundantøku fyri persónbilar, sum antin verða drivnir av eli ella vetni. Eftir uppskotinum skal hendan undantøkan halda fram í 2021 og 2022, meðan tá komið verður til 2023 og frameftir, so skulu persónbilar, sum antin verða drivnir av eli ella vetni gjalda skrásetingargjald: 30% av teim fyrstu 100.000 kr. og síðani 45% av upphæddini omanfyri 100.000 kr. Hesum tekur meirilutin undir við.

Harumframt verður skotið upp, at persónbilar við hybrid tøkni (HEV) og plugin-hybrid tøkni fáa lægri skrásetingaravgjald enn í dag. Skotið verður upp, at avgjaldið á teim fyrstu 100.000 kr. lækkar frá 50% til 30%, og at avgjaldið av tí, sum er omanfyri 100.000 kr., lækkar frá 75% til 45%. Hesa broyting metir meirilutin verða skilagóða, tí hon fer at minka um CO2 útlátið, tí persónbilar við hesi tøkni hava væl lægri CO2 útlát enn bensin- og dieselbilar. Meirilutin tekur tí undir við hesi broyting, men við teirri treyt, at tað bert snýr seg um hybrid-bilar (HEV) og ikki mild hybrid (MHEV).

Hesar báðar broytingarnar merkja, at í 2023 og árini frameftir verða el-, vetnis-, hybrid og plugin-hybridbilar sostatt javnsettir viðvíkjandi skrásetingargjaldi.

Skotið verður eisini upp, at innfluttar, brúktar motorsúkklur, sum hava verið endaliga skrásettar uttanlands, frameftir verða avgjaldsroknaðar á sama hátt sum innfluttir, brúktir bilar, sbrt. § 6. Hetta merkir, at 35 % skal gjaldast í virðisavgjaldi av keypsprísinum frá útlendskum seljara, íroknað flutningsútreiðslur, trygging og kostnað, sum er CIF virðið, sum er grundarlagið undir útrokningini av virðisgjaldinum. Meirilutin heldur, at hendan broyting eigur at verða betri útgreinað í mun til tørvin á henni, og hvørjar avleiðingar hon kann fáa.

Skotið verður upp at akfør, sum eru flytigóðs, verða undantikin skrásetingargjaldi. Meirilutin heldur, at áðrenn broyting verður gjørd á hesum økinum, so eigur ein lýsing at vera til taks, um hvørjar avbjóðingarnar eru við lógini, sum hon virkar í dag, og hvørjar møguligar nýggjar avbjóðingar kunnu stinga seg upp, um hendan undantøkan gerst veruleiki. Neyðugt er at gera hesa lýsing, áðrenn støða verður tikin til, at akfør, sum eru flytigóðs, verða undantikin skrásetingargjaldi.

Eisini verður skotið upp at fara frá upprunavirðinum til útveganarprís í sambandi við útrokning av skrásetingargjaldinum fyri innfluttar, brúktar bilar. Nevndini er upplýst, at verandi skipan fyri innkrevjing av skrásetingargjaldinum fyri innfluttar, brúktar bilar er umsitingarliga tung. Heldur enn at gera hesa ætlaðu broyting, so mælir meirilutin til, at hildið verður fast við upprunavirðið, men at møguleikar verða kannaðir og troyttir, soleiðis at verandi skipan fer at verða lættari at umsita frameftir.

Fyri at hýru- og skúlavognar skulu sleppa undan at rinda virðisavgjald, skal akfarið ikki verða skrásett til privata nýtslu innan 30 mánaðir frá tí degi, akfarið er skrásett. Um akfarið verður skrásett, áðrenn 30 mánaðir eru gingnir, skal virðisavgjaldið rindast lutfalsliga samsvarandi tíðini, sum restar í teimum 30 mánaðunum. Skotið verður upp at lækka tað ásetta mánaðartalið frá 30 mánaðum til 20 mánaðir við tí endamáli, at hýruvognarnir ikki skulu missa virðið ov skjótt, tí at koyrdir kilometrar í samband við víðari sølu hava týdning fyri søluprísin. Hesari broyting tekur meirilutin undir við.

Nevndini er upplýst, at prislækkingin á hybrid-bilum kann hava við sær inntøkumiss í sambandi við sølu av samsvarandi bensin- og dieselbilum. Upplýst er, at tá kostnaðurin á hybrid-bilum við hesi lógarbroyting nærum verður á sama støði sum bensin- og dieselbilar, so kann tað vera, at viðskiftafólk einans fara at keypa hybrid-bilar. Av hesi orsøk kann hugsast, at bilasølurnar møguliga ikki fara at sleppa av við teir bensin- og dieselbilarnar, sum longu eru á goymslu, uttan at lata avsláttur, og hetta kann sostatt hava við sær mistan vinning ella í ringasta føri tap fyri bilasølurnar.

Meirilutin væntar, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum útgreinar hesa møguligu avbjóðing og umhugsar, um landið eigur at vera við til at lofta hesum møguliga trupulleika, og um so er, hvussu hetta kann verða gjørt.

Við hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 2 verður § 3, stk. 2 orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Persónbilar við hybrid tøkni (HEV) ella plugin-hybrid tøkni (PHEV), og sum verða skrásettir frá 1. januar 2021, skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr."
2. Í § 1 verða nr. 3, 4, 7, 8 og 9 strikað. Nr. 5 og 6 verða eftir hetta nr. 3 og 4.
3. Í § 1, nr. 5, sum verður nr. 3, verður "mánaðum" tvær ferðir broytt til: "mánaðunum".
4. § 1, nr. 6, sum verður nr. 4, verður orðað soleiðis: "**4.** § 7, stk. 1, nr. 8 verður orðað soleiðis: "8) Motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum eru skrásett í seinasta lagi 31. desember 2022.""

5. § 2 verður orðað soleiðis:

”**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá og við 1. januar 2021.”

Viðmerkingar:

Til nr. 1:

Við hesi broyting nágreinar man í lógartekstinum, at ásetingin einans umfatar persónbilar við antin hybrid tøkni (HEV) ella plugin-hybrid tøkni (PHEV), og ikki um persónbilar við sonevndari mild hybrid tøkni (MHEV).

Til nr. 2:

Við hesi broyting strikar man tær lógarbroytingarnar, sum viðvíkja ávikavist avgjaldinum á innfluttar, brúktar motorsúkklur, avgjaldsundantøkuni fyri akfør, sum eru flytigóðs, og at farast skal frá upprunavirðinum til útveganarprís í sambandi við útrokning av skrásetingargjaldinum fyri innfluttar, brúktar bilar.

Til nr. 3:

Talan er um eina lógartekniska broyting.

Til nr. 4:

Lógaruppskotið varð lagt fram fyri jól, og 1. januar 2021 varð § 7, stk. 1, nr. 8 strikað við løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019. Tí er neyðugt at seta ásetingina inn aftur í lógina, nú í broyttum líki, har undantøkan fyri virðisavgjald verður longd við teimum tveimum árunum, sum landsstýrismaðurin skjýtur upp.

Til nr. 5:

Ásetingin um gildiskomu verður broytt frá 1. januar 2021 til at vera dagin eftir kunngerð, men tó verður ásett, at lógarbroytingin fær virknað frá og við 1. januar 2021.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Aksel V. Johannesen, Páll á Reynatúgvu og Ruth Vang) mælir til nakrar broytingar.

Minnilutin heldur tað vera alt annað enn nøktandi, at landsstýrismaðurin leggur hetta uppskotið fram á Løgtingi tann 8. desember 2020, sum skal hava virknað frá 1. januar 2021. Eitt uppskot, sum als ikki hevur verið til hoyringar og hevur eina rúgvu av grundleggjandi broytingum við sær, sum kunnu hava stóra ávirkan á grøna umskiftið, stóra ávirkan á inntøkur landskassans og eisini ávirka kappingina í bilasøluvinnuni.

Minnilutin tekur ikki undir við, at virðisavgjaldið á bilar við hybrid- ella plugin-hybrid tøkni verður lækkað. Fíggjarnevndin hevur frá fakkunnleikanum fingið at vita, at hybrid-bilar á ongan hátt eru “grønir bilar”. Við at lækka avgjøldini á hybrid-bilar eggjar politiska skipanin føroyingum at keypa hesar bilar. Hetta er beinleiðis í ósamsvari við orkupolitikkin hjá landinum. Skulu avgjøld lækkast á plugin-hybrid bilar, eigur hetta at gerast í tøttum samstarvi við orkumyndugleikan hjá landinum, sum er Orka á Umhvørvisstovuni.

Minnilutin tekur undir við, at talið á mánaðum í § 7, stk. 1 nr. 1 í lógini verður lækkað úr 30 niður í 20.

Minnilutin tekur ikki undir við, at flytigóðsbilar verða undantiknir virðisavgjaldi. Hetta hevði havt við sær, at hesir bilar kunnu sleppa undan avgjaldinum bæði í Danmark og í Føroyum, og kann tí uttan iva hava spekulatión við sær.

Viðvíkjandi innflutningi av brúktum bilum og motorsúkklum, so tekur minnilutin ikki undir við, at ásetingin um upprunavirði verður broytt.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1 verða nr. 2, 3, 4, 7, 8 og 9 strikað. Nr. 5 og 6 verða eftir hetta nr. 2 og 3.
2. Í § 1, nr. 5, sum verður nr. 2, verður "mánaðum" tvær ferðir broytt til: "mánaðunum".
3. § 1, nr. 6, sum verður nr. 3, verður orðað soleiðis: "**3.** § 7, stk. 1, nr. 8 verður orðað soleiðis: "8) Motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásett frá 1. januar 2021 til og við 31. desember 2024.
4. § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá og við 1. januar 2021."

Viðmerkingar:

Til nr. 1:

Við hesi broyting strikar man tær lógarbroytingarnar, sum snúgva seg um ávikavist at lækka avgjaldið á persónbilar við hybrid tøkni og plugin-hybrid tøkni og at javnseta el- og vetnisbilar við hybrid og plugin-hybrid bilar í 2023 og frameftir, at broyta avgjaldið á innfluttar, brúktar motorsúkklur og persónbilar, og at innføra avgjaldsundantøku fyri akfør, sum eru flytigóðs.

Til nr. 2:

Talan er um eina lógartekniska broyting.

Til nr. 3:

Lógaruppskotið varð lagt fram fyri jól, og 1. januar 2021 varð § 7, stk. 1, nr. 8 strikað við løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019. Tí er neyðugt at seta ásetingina inn aftur í lógina, nú í broyttum líki, har undantøkan fyri virðisavgjald verður longd við fýra árum, heldur enn teimum tveimum árunum, sum landsstýrismaðurin í uppskotinum skjýtur upp.

Til nr. 4:

Ásetingin um gildiskomu verður broytt frá 1. januar 2021 til at vera dagin eftir kunngerð, men tó verður ásett, at lógarbroytingin fær virknað frá og við 1. januar 2021.

Fíggjarnevndin, 9. februar 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	